## NØVN Í VIKUNI

# Annfinn Brekkstein formaður



Annfinn Brekkstein, borgarstjóri á Velbastað, er nú formaður í valfelag Sambandsfloksins í Suðurstreymoy, Føroya Væl.

Felagið hevði aðalfund mánakvøldið, og tá varð nýggj nevnd vald.

Bent Jákup Hansen, sum var formaður í felagnum, Egga Jensen og Petur Weihe stillaðu ikki uppaftur. Annfinn Brekkstein og Súsanna Dam stóðu ikki fyri vali hesaferð. Sum nýggir nevndarlimir vórðu valdir Kaj Leo Johannesen, Heini Fossá og Michael Jensen.

Nýggja nevndin skipaði seg við Annfinni Brekkstein sum formanni, Heina Fossá sum næstformanni og Súsonnu Dam sum kassameistara. Eykalimir í nevndini eru Schumann Hjaltalin og Bent Jákup Hansen.

# Jógvan Durhuus 65 ár



Mikudagin 19. februar fylti Jógvan Durhuus fyrrverandi løgtingsmaður 65 ár. Jógvan er føddur og uppvaksin í Vestmanna. Hann hevur verið postavgreiðslumaður í Vestmanna síðan 1960. Hann sat á Løgtingi fyri Tjóðveldisflokkin frá 1970-1980, frá 1984-1990 og frá 1994-2002. Hann var landsstýrismaður frá 1985-1989. Í dag arbeiðir Jógvan á høvuðsdeildini hjá Postverkinum á Óðinshædd í Havn.


# Nøvn í vikuni

**Kennir tú onkran …**

Kennir tú onkran í familjuni, á arbeiðsplássinum, í grannalagnum ella hvar tað skal vera, ið hevur ein merkisdag sum t.d. rundan føðingardag, brúdleypsdag, starvsdag ella onkran, sum hevur fingið nýtt starv ella annað, so sig okkum frá.



Tú skal bara skriva navn og bústað og um gjørligt aðrar upplýsingar eisini um tann persónin tú heldur eigur at koma í blaðteigin "Nøvn í vikuni", so taka vit okkum av restini. Tú er eisini vælkomin at senda okkum nøkur orð og um møguligt mynd. Annars hava vit góðar journalistar og fotografar til slíkar uppgávur.

Navn:......................................................................................................
Bústaður:..................................................................................................
Bygd/býur:...................................................Tel:....................................
Evt. arbeiðspláss:.....................................................................................

Merkisdagurin er: .....................................................................................

Innsendari: ........................................................Tel:................................

Sendið lepan, í brævbjálva, til:
Sosialurin • Postboks 76 • FO-110 Tórshavn • "Nøvn í vikuni"

Eisini ber til at støkka inn á gólvið, ringja, faxa ella senda teldupost til redaktiónir okkara kring alt landið:

Høvuðsstaðarøkið: tel. 311820/216135, fax 314720, teldupost: maggi@sosialurin.fo
Norðoyggjar: tel. 458686, fax 458687, teldupost: solby@sosialurin.fo
Eysturoy: tel. 447820, fax 449520, teldupost: vilmund@sosialurin.fo
Suðuroy: tel. 375364, fax 375464, teldupost: aki@sosialurin.fo
Vágar: tel. 333820, fax 333720, teldupost: edvard@sosialurin.fo




*Ternan I fer seiansta túrin av Havnini inn á Skálafjørðin týsdagin kl 16:20. Frá mikumorgni mugu fólk, ið nýta almennu flutningsskipanina, ferðast við bussi millum Skálafjørðin og Havnina*

# Seinasti túrur inn á Toftir verður týsdagin

**Týsdagin verður Skálafjarðarsiglingin niðurløgd**

STRANDFERÐSLA
*Eirikur Lindenskov*

Týsdagin kl 16.20 fer Ternan I seinasta túrin av Havnini inn á Skálafjørðin.

Broytingar eru gjøgdar í løgtingslógini, soleiðis at Skálafjarðarleiðin ikki longur er umfatað av lógini um flutningsskyldu, sigur Poul Jákup Thomsen, fólkaflutningsleiðari hjá Strandferðsluni.

Frá mikumorgni 26. februar verður broytt og nýggj ferðaætlan hjá Bygdarleiðum fyri leiðini Toftir - Tórshav – Toftir sett í gildi. Broytingarnar í ferðaætlanini verða lýstar í bløðunum týsdagin, verður sagt av Strandferðsluni.

# Kvæði úr ferðaskríninum

DANSUR
*Tíðindaskriv*

Leygardagin klokkan 16:00 fer norðurlendski bólkurin »Kvedar« at framføra í Klingruni í Norðurlandahúsinum. Eisini verður Nólsoyar Danisfelag við í tiltakinum, sum hevur undirheitið »Eldgamle kvad og nysmidde stev med dans - frå det nordiske ferdaskrinet«

Seks fólk manna bólkin "Kvedar", ein dansari og fimm sangarar. Sangararnir eru Aiva Insulander úr Svøríki, Marianne Maans úr Finnlandi, Agnes Buen Garnås, Halvor Håkanes og Eli Storebekken, sum øll fýra eru úr Noregi. Dansarin er Cathrine Smith, sum eisini er úr Noregi.

Tólv dansarar úr Nólsoyar Dansifelag eru eisini við, nú »Kvedar« vitja í Føroyum.

Agnes Buen Garnås er millum kendastu norðurlendsku sangarar og granskarar á hesum øki. Hon hevur m.a. givið út plátu »Rosensfole« saman við víðagitna saksofonspælaranum Jan Garbarek á plátefelagnum ECM.

Úr norðurlendska ferðaskríninum hava tey í »Kvedar« leitað fram felags norðurlendskar vísur, sum verða settar saman í eina serstaka skrá.

Framførdar verða sonevndar gátuvísur úr Eddukvæðunum, lokkavísur úr seinnu miðøld, eins og skemtivísur í ymsum skapi. Framførdu vísurnar eru bæði úr livandi hevd og úr gomlum, skrivaðum heimildum. Hóast tekstir og løg úr ferðaskríninum hjá "Kvedar" kunnu vera túsund ára gomul, eru eisini nýsmíðað stev og vísur á skránni.

Dansarin Cathrine Smith leitar inn í hesar søgur og við dansi gevur hon aldargomlu søgunum eitt nútíðar andlit. Partur av pallmyndin eru myndir og vovið teppi, sum Nina Thormodsæter Haugen hevur tilevnað.

Tey ferðandi hava sjálvi skapt framførsluna, sum higartil hveur vitjað í Noregi, Svøríki, Finnlandi og Álandi. Føroyska framførslan hjá »Kvedar« og Nólsoyar Danisfelag verður í Klingruni í Norðurlandahúsinum leygardagin 22. februar klokkan 16:00. Atgongumerki, sum kosta 80 krónur, fáast í Húsinum.



## UTTAN ÚR HEIMI

# Saddam bangin fyri kvetti



*Saddam Hussein sigst hava sett sín verjumálaráðharra í húsavarðhald, tí hann er bangin fyri einum kvetti ímóti sær. Aðrir slíkir hava fingið aðra lagnu*

*Mynd: Reuters*

**Hóttanin um eitt amerikanskt álop skal hava fingið fleiri hermenn at rýma úr irakska herinum. Samstundis ljóðar, at Saddam Hussein hevur sett verjumálaráðharran í húsavarðhald. Tað avsanna irakar, men aðrar keldur hast fast um, at tíðindini eru sonn**

IRAK
*Árni Joensen*

- Hatt er ikki bert slutur, men láturligt slutur, skal Naji Sabri, uttanríkisráðharri hava svarað, tá hann fyri nøkrum døgum síðani varð spurdur, um starvsfelagi hansara í iraksku stjórnini, Sultan Hashim Ahmed al-Jabburi Tai, verjumálaráðharri er settur í húsavarðhald.

Tíðindini um, at verjumálaráðharrin er settur í húsavarðhald, eru sambært bretska blaðnum The Guardian frá einum embætismanni, sum hevur gott samband við tann ráðandi Baath-flokkin hjá Saddam Hussein.

- Verjumálaráðharrin er á stjórnarfundum, sum hann altíð plagar at vera, og hann er eisini í sjónvarpssendingum, sum um einki var hent. Men veruleikin er, at hann er alla tíðina umgyrdur av lívverjum hjá forsetanum, so hann ikki sleppur at flýggja, sigur tann ónevndi irakski embætismaðurin við The Guardian.

Tíðindini koma annars rættiliga óvæntað. Verjumálaráðharrin er ikki einans ein av teimum leiðandi monnunum kring Saddam Hussein. Hann hevur eisini annað samband við forsetan. Ein dóttur hansara er gift við tí 36 ára gamla Qusay Hussein, sum er sonur Saddam Hussein.

### Fleiri royndir

Vesturlendskir serfrøðingar í irakskum viðurskiftum siga, at seinastu árini hevur Saddam Hussein skipað eina trygdarskipan, sum fyrst og fremst hevur til endamáls at tryggja, at hann kann verða sitandi.

Forsetin hevur eisini prógvað, at hann er náðileysur ímóti teimum, sum gera sjálvt ta minstu roynd at seta seg upp ímóti honum. Ein fyrrverandi verjumálaráðharri, Adnan Khairallah Tulfah, doyði í einari tyrluvanlukku í 1989. Hann varð roknaður sum krígshetja frá krígnum við Iran, men hildið varð, at talan var ikki um eina vanlukku, men at hann varð fyribeindur. Vælsitandi keldur vildu tá vera við, at krígshetjan var vorðin so væl umtókt millum hermenninar, at Saddam Hussein metti hann ráðharran vera eina hóttan ímóti sær.

Síðani Flógvakríggið í 1991 hava einar fýra ella fimm royndir verið at fella Saddam Hussein, men hvørja ferð eru royndirnar avdúkaðar, og teir, sum skipaðu fyri, fingu harðastu revsing. Sambært serfrøðingunum hendi tað meiri enn so, at alt húskið hjá kvettmonnunum varð tikið av døgum.

### Iran liggur framvið

Vælsitandi keldur vilja eisini vera við, at stjórnin í Bagdad ber ótta fyri, at herurin ætlar at sleppa undan einum amerikanskum álopi við at koyra Saddam Hussein frá. Kurdisk bløð skrivaðu í síðstu viku, at forsetin hevði sent limir í iranska andstøðufelagsskapinum MKO til fleiri hermannalegur at forða fyri, at hermenn eggja øðrum til at gera uppreistur. Hermenninir hjá MKO eru iranar, men teir hava støð í Irak, har teir fáa stuðul frá stýrinum í Bagdad. Tað ljóðar eisini, at hermenn hjá MKO eru sæddir á markinum millum Irak og Sýrialand og á markinum millum Irak og Kuwait. Hildið verður, at MKO fer at taka lut í bardøgunum ímóti einum møguligum amerikanskum álopi.

Men MKO-hermenninir eru ikki teir einastu iranararnir, sum eru í Irak. Tað ljóðar, at iranska stjórnin hevur sent einar 5.000 shiamuslimskar uppreistrarmenn inn í tað kurdiska økið í Norðurirak. Alment verður sagt, at talan er um verjutiltak, og at shiamuslimsku uppreistrarmenninir skulu forða MKO-hermonnum at søkja at Iran. Men vesturlendskir serfrøðingar ivast ikki í, at iranska stjórnin við hesum roynir at vísa á, at hon skal eisini sita við borðið, tá framtíð Iraks skal avgerast, verður Saddam Hussein rikin frá.

Eygleiðarar vísa á, at hetta sigur eitt sindur um, hvussu torført tað er at meta um avleiðingarnar av einum møguligum Irakkríggi.